# orðini*

er tað Tóroddur Poulsen, ið stendur fyri skotum. Teir illa umtóktu yrkjararnir verða skýrdir postmodernistar og fáa teir toyggið í mangari grein fram til tað nýggja "Outsider Magazin 2/3", har postmodernisman endiliga verður dømd deyð at vera. Við einum sitatið hjá Hans Otto Jørgensen staðfestir Kim: "Við hesum kunnu vit uttan iva siga, at eftir 10-15 ára ironiska og snerkjandi postmodernismu er hon endiliga liðug. Hon er hervið avblást av rithøvundaskúlastjóranum og fleiri gomlum næmingum í blaðstjórnini (t.e. fyri tíðarritið Den blå port)..". Sambært Outsider Magazin er tað bert Carl Johan, sum hevur bjargað sær undan postmodernismunar Titanic og hetta hevur hann megnað við skaldsøguni "Ó", ið sigst umboða eina sanna umvending í hansara skaldskapi. Einsamallir á einum flaka reka nú postmodernaðu zombie-yrkararnir Oddfríður og Tóroddur. At lesihættirnir eru ymiskir, tað vita vit, sum í 80´unum upplivdu freudianskar lærarar, sum skóru í fagnaðarróp hvørja ferð næmingarnir komu fram á stavar, hattar, taskur og gularøtur, sum í teirra eygum ikki kundu vera annað enn myndamálsligar tilsipingar til ávikavíst tað mannliga og kvinnuliga kynið. Seinni kundi staðfestast, at kunnleiki um Freud og Marx og øll hini ikki var so galin, men at eingin teirra áttu tað endaligu tulkingina.

### Hann sum leitar finnur

Í greinini "At tora at siga okkurt vakurt aftur" skrivar Kim Simonsen m.a.: "(postmodernaða yrkingin) dyrkar tað tilvildarliga, hevur ein opnan form, ella tilvildarligan form, altíð er eitt element av pastiche, ironi, metareflektión í tekstinum, røddir blandaðar saman og genrur...(postmodernaða yrkingin hevur) endaliga uppgivið at koma við eksistentiellum tilverutulkingum av nøkrum sum helst... byggir á bókmentaástøði, ið aftur byggir á ta heimspeki, at einki sentrum er longur, at sjálvt subjektið er uployst...(postmodernaða yrkingin er) nihilistisk, skeptisk og eitt brongl av ógjøgnumtreingiligum røddum. Ein kakafoni av málspølum, teksti og talu uttan sentrum ella møguleika fyri referansu ella kontakt við umheimin.." (s.12-13 í Outsider Magazin 2/3-2006). Møguliga ein frálík gjøgnumgongd av postmodernaðum yrkingum, men ikki av yrkingum Tórodd Poulsens ella Oddfríð Rasmussens, ið báðir eiga sera ymiskar, men harímillum bæði vakrar og tilverutulkandi yrkingar, eins og Ó hinvegin er full av metareflektión, m.a. í tí lystiliga kelduspælinum. Tað er kanska her, spurningurin um hvussu mann lesur, gerst áhugaverdur. Hvat tú sært valdast hvørjum tú hyggur eftir og hyggur tú t.d. bert eftir postmodernsimu eyðkennum, so er tað kanska tey, tú sært. Fyri tað fyrsta er ógvuliga stórur munur millum t.d. Tórodd og Oddfríð, men báðir eru teir skaldsliga í ætt við gomlu modernistarnar; Mallarmé, Rimbaud, og krevja av lesaranum, at hann er tolin, opinskáraður og fyrikomandi, eisini yvir fyri tí, sum ikki gongur út uppá at líkjast poesi. Í summum yrkingum hjá Tóroddi Poulsen er myndastreymurin so tættur, at lesarin má lesa spakuliga fyri at fáa alt við. Aðrar yrkingar eru so naknar og einfaldar, at tú hevur ringt við at góðtaka, at tær kunnu innihalda nakað sum helst. Á sama hátt sum staddur yvir fyri myndlistini hjá Tóroddi, kennir áskoðarin seg ótryggan. Hetta sær so ómakaleyst út. Er hetta nakað? Svarið er sjálvandi upp til hvønn einkultan at avgera, men tað hjálpir at førka seg spakuliga yvirum orðini og lesa uttan undirlutakenslur og uttan at lata seg lumpa av bókstavarími og bráðvakrum orðingum sum váttan um sanna poesi. Tað allarløgnasta er, at yrkingarnar hjá Kim Simonsen (umframt ein ásannaðan íblástur frá Thor Ulven) eru farnar at líkjast yrkingunum hjá Tóroddi og so er spurningurin - um vit venda aftur til freudiansku terminologiina – hvørt uppgerðin við tann eldra yrkjaran kann síggjast sum eitt slag av bókmentaligum faðirmorði. Kim Simonsen nýtir javnan Hugo Friedrich og Poul Borum sum heimildir í greinum sínum. Báðir eru teir framúrskarandi bókmentafrøðingar, sum eg og Kim ivaleyst lesa á ymiskan hátt. Tí so frægt eg dugi at lesa, draga Borum, Friedrich og forrestin eisini Lars Bukdal (sambært Outsider eisini ein verri postmodernistur) somu modernistisku línu, sum Mallarmé, Rimbaud, Tóroddur Poulsen og Oddfríður Rasmussen draga á hvønn sín eyðkenda hátt. Hóast Kim Simonsen í síni uppgerð móti postmodernismuni møguliga hevur sett kikarin fyri blinda eygað, eru fólk sum hann við orku og dirvi til at skriva, ummæla og viðmerkja fulla tíð, ein ómissandi partur av menningini og yrkisgerðini av einum føroyskum listaummælaraumhvørvi.

* Yvirskriftin er úr: Tóroddur Poulsen: Morgunbókin 2005. Greinin endurgevur eisini úr: Outsider Magazin 2/3 2006 v/Kim Simonsen.

*Myndirnar gjørdi Tóroddur Poulsen á Grafiska Verkstaði Føroya 2005/2006.*

...
flugurnar ið surra runt um sukurskálina
verða bara naskari og naskari
viðhvørt seta tær seg á armin
og títt brosandi andlit
til síðst eiga tær allan kroppin
sum vit umsíður halda
er vorðin heilur heimur
nú himmalin ber seg at
sum um vit hava sagt ov nógv
...
(Tóroddur Poulsen. Morgunbókin, s.39)

at fara inn í kirkjuna
og bara trúgva uppá byggiharran
tað tími eg ikki

so seti eg meg heldur
í eina gamla húsatoft
og njóti ælini í takksemi

til tann ið gav okkum tey
so tekjurnar kunnu skolast reinar
eins og trappurnar inn í kirkjuna

og tostin gamli kann sløkkjast
eins og eldurin í neðra
sum eg heldur ikki trúgvi uppá

er til aðrastaðni
enn inni í okkum sjálvum
tá tekjan tyngist niður á okkum

(Tóroddur Poulsen. Morgunbókin, s.22)

...
Ein firvaldur situr á mínum knæi
í hvussu er annar okkara
leingist eftir gudi
tað er so gott at vita
hvørjum ein skal takka fyri
at skapanarverkið angar sum tað ger
...
(Tóroddur Poulsen. Eygnamørk, s.44)

Tey sum longu hava skrivað okkurt –
hava logið á einum máli,
tey ikki skilja

-

Eiga ikki orðini
vita ikki, hvat tey siga
tey, sum longu hava skrivað okkurt

(Kim Simonsen. Yrking prentað í Outsider 2/3 s.173)

Hvussu tónalagið fær okkum at minnast,
at vit altíð longdust sum børn
meðan frostrósur á vindeyganum
fjaldu útsýnið til staraflokkin uttanfyri

(Kim Simonsen. Yrking prentað í Outsider 2/3 s.174)



*Sloyfutræ 06*



*Trol 2001*